90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# JÓHANNA AV STEINUM



FAKTA **JÓHANNA AV STEINUM**

**Aldur:** 29 ár
**Bústaður:** Amager í Keypmannahavn
**Starv:** Sniðgevi
**Familja:** Gift við Dánjal Hoydal

MYND: PRIVAT

# Eg havi gjørt nógv **ljót ting**

**Nær lærdi tú teg at binda?**
Tað lærdi eg meg, tá eg var heilt lítil. Haldi eg var um 4-5 ár, tá eg hjálpti mammu at binda okkurt. Minnist eisini, at eg bant eina dukkiskipstroyggju.

**Hvat er ljótasta plagg tú hevur bundið?**
Tað er nokk okkurt, sum eg gjørdi á universitetinum. Tá helt eg, at eg gjørdi okkurt ordiliga kul, men aftaná sá eg, at tað var totalt gys. Eg havi gjørt nógv ljót ting.

**Hvat ger teg bangna?**
At ikki eydnast við tí, eg geri.

**Hvørjum sniðgeva hevur tú størst virðing fyri?**
Vivienne Westwood. Hon klárar altíð at endurskapa seg sjálva, hóast at hon nú er ein gomul dama.

**Hvat er dýrasta plagg, tú hevur keypt tær?**
Tað er nokk ein leðurjakki, sum kostaði um 3.000 krónur.

**Hvar keypir tú tíni klæði?**
Alla møguliga staðni. Í endurnýtsluhandlum, Hennes&Mauritz og designarahandlum. Mær dámar sera væl vintageklæði.

## Hvar hevði tú viljað verið ein fluga á vegginum?
á vegginum í teknistovuni hjá Vivienne Westwood

**Hvat er flóvisligt?**
Eg eri mangan flóv av mínum vánaliga staðsansi. Tá eg ikki finni okkurt og má spyrja um veg, hóast tað er beint framman fyri nøsini á mær.

**Hvørjum hevur ein tú veikleika fyri?**
Eg keypi sera nógv brúkt ting. Eg elski loppumarknaðir, og trupulleikin er bara, at eg veit ikki, hvat eg skal gera við alt.

**Hvat ert tú gleðast yvir við tíni egnu útsjónd?**
Eyguni. Eg síggi illa við teimum, men tey hava ein serstakan lit, gul innast, ið mær dámar.

**Hvør núlivandi føroyingur er ordiliga kulur?**
Barbara í Gongini er kul. Hon er dugnalig og góð at hava við at gera.

**Hvørjir eru tínir størstu veikleikar?**
At gloyma at hava álit á meg sjálva. Og so dugi eg illa at selja meg sjálva.

**Hvat ger teg illa?**
Tá fólk eru óseriøs.

## Hvat ger teg glaða?
Sólin og litir. Og so sjálvandi maður mín Dánjal, hann ger meg allar glaðast.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
At tora at taka kjansir og ikki verða bangin fyri at royna nakað nýtt.